Frá Sunda kommunu

# Pedagogur/hjálparfólk til Frítíðarskúlan í Hvalvík

Pedagogur/hjálparfólk til Frítíðarskúlan í Hvalvík.

Søkt verður eftir einum pedagogi og einum hjálparfólkið til Frítíðarskúlan at byrjað 14. august 2006.

Størvini at søkja eru:
1 pedagog 30 t/v.
1 hjálparfólk 30 t/v.

Hjálparfólkastarvið, er eitt barnsburðaravloysarastarv. Avloysari verður settur í tíðarskeinum frá 14. august 2006 til uml. 22. januar 2007.

Frítíðarskúlin liggur í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi, har tann vælkenda áin rennur, og ein nýggjur fótbóltsvøllur eisini er tætt við.

**Vit ynskja**
- At tú hevur hug at arbeiða við størri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara frítíðarskúla.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara í barnagarðinum, á tlf. 772021 ella 422717.

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til:

**Barnagarðin við Kráir**
Fo – 430 Hvalvík
e- mail: nosi@post.olivant.fo

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann 19. juni 2006.





## Kunngerð

**Broyting í byggisamtyktini fyri Kollafjørð**

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 8. juni 2006 samtykti broytingar í byggisamtyktini fyri Kollafjørð.

Ætlaða broytingin er, at havnaøkið á Langasandi verður víðkað, soleiðis at økið har Kollafjørð Pelagic liggur og uml. 280 m eystureftir frá verandi uppfylling verður B2-havnaøki.

Tilfar, um ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 19. juni til og við 10. juli 2006, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 19. september 2006.

Tórshavnar kommuna






Nú ber aftur til at melda seg til bachelorútbúgving í lívfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Í útbúgvingini verður dentur m.a. lagdur á føroyska lívfrøði, har mong áhugaverd fyribrigdi eru at finna. Føroyska náttúran verður rannsakað bæði á sjógvi og landi. Visti tú t.d.

- At haran, sum varð innførd til Føroya í 1855, ið fyrstuni hevði hvítan vetrarbúna, men at liturin eftir fáum árum broyttist til vælkenda gráa litin alt árið?
- At tann føroyski starin er størri enn aðrastaðni, og tí eitur Sturnus vulgaris faroensis?
- At toskur ongastaðni veksur so skjótt sum á Føroyabanka?
- At tað eru 169 ymisk sløg av svartaklukkum í Føroyum?

***Upptøkutreytir***
Fyri at verða upptikin til útbúgvingina krevst antin støðd-, alis- og evnafrøði á B-stigi ella B-stig í støðd- og alisfrøði saman við C-stigi í evnafrøði og A-stigi í lívfrøði. Aðrar fortreytir kunnu koma upp á tal eftir nærri meting í hvørjum einstøkum føri.

***Meir at vita***
Meir fæst at vita á heimasíðuni www.nvd.fo ella við at venda sær til Náttúruvísindadeildina, telefon 352550, og spyrja eftir Eyðfinn Magnussen.

***Umsóknarbløð***
Umsóknarbløð fáast á www.nvd.fo ella við at venda sær til Náttúruvísindadeildina.

***Umsóknir***
Umsóknir skulu sendast til Náttúruvísindadeildina, Postboks 2109, FO 165 Argir. Umsóknarfreistin er 1. juli 2006. Boð um upptøku verða givin í seinasta lagi 16. juli 2006.



## LANGUR LEYGARDAGUR Í SANDOYNNI

Leygardagin 17. juni hava hesir handlar, matstovur, kioskir og hárfríðkanar langan leygardag:

Búrhandilin, Skopun
Handilshøllin, Skopun
Cafè & Grill, Skopun
Ellubitin, Sandur
P/F Rólant Vidtfeldt, Sandur
Timburhandilin Sand, Sandur
Handilin hjá Elinborg, Sandur
Bakaríið, Sandur
Shell, Sandur
Klædnabúðin, Skálavík
Neystið, Skálavík
Dalabúðin, Skálavík
Salong Ketty, Sandur

Øll hava tey spent seg út við hópin av góðum tilboðum, sum verða borin í hvørt hús í sýsluni.
Handlarnir hava opið til kl. 17.00 – summir handlar, kioskir og matstovur hava opið longri.

Sandoyar Kunningarstova







## TIL SØLU ELLA LEIGU



Um hóskandi boð fæst selja vit sethús okkara við Grønlandsvegin 42 í Tórshavn.

Øll húsini eru innrættaði og væl hildin.
Húsini liggja sera væl fyri.

Umhvørvið er veðurgott, friðarligt og stutt er oman í miðbýðin.

***meira fæst at vita á***
**tlf 22 80 90 ella jpj@nordcar.fo**





# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo



# Partabrøv til sølu

Um nóg høgt boð fæst, eru partabrøvini í Sp/f Marknoyri í Vági til sølu.

Sp/f Marknoyri hevur bygning, sum hotell- og matvøruvirksemi er í.

Áhugaði kunnu ringja 373961 ella fartlf. 222918.

***HOTEL BAKKIN***